SEV

www.sev.fo

# søkir MASKINMEISTARAR til Fossáverkið og Vágsverkið

### Maskinmeistari til Fossáverkið

Eitt starv sum maskinmeistari á Fossáverkinum í Vestmanna er leyst at søkja til setan 1. apríl 2008 ella skjótast til ber.

Arbeiðið umfatar rakstur og hald av Fossáverkinum, bæði sum dagarbeiði og vaktarbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Á Fossáverkinum eru 2 turbinur upp á tilsamans 6,4 MW. Undir Fossáverkinum hoyra eisini fylgjandi vatnorkuverk og vindmyllur, sum verða stýrd frá Fossá-verkinum:

- Mýruverkið við einari turbinu upp á 2,4 MW
- Heygaverkið við einari turbinu upp á 4,8 MW
- Eiðisverkið við tveimum turbinum upp á tilsamans 13,4 MW
- Vatnturbinan á Strond upp á 1,4 MW
- 4 vindmyllur í Neshaganum upp á til-samans 2 MW.

Talan er sostatt um tilsamans 7 vatnturbinuaggregat og 4 vindmyllur við einum samlaðum mátti upp á 30,4 MW.

Harafturat stýrir vakthavandi á Fossáverkinum býtið av framleiðsluni millum elverkini í meginøkinum, herundir eisini Sundsverkið og Strond (lastfordeiling).

Eisini er vakthavandi á Fossáverkinum koblingsleiðari fyri háspenningsanleggini í meginøkinum.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Pól Joensen, verkmeistara á Fossáverkinum, ella til Berg Didriksen, deildarstjóra, báðir á telefon 346800.

### Maskinmeistari til Vágsverkið

Eitt starv sum maskinmeistari við elverkini í Suðuroy er leyst at søkja til setan frá 1. apríl 2008 ella skjótast til ber.

Talan er um avloysarastarv fyri maskinmeistara í farloyvi, og verður setanin tí tíðaravmarkað til 1. apríl 2009.

Arbeiðið umfatar rakstur og hald av elverkunum í Suðuroy, bæði sum dagarbeiði og vaktarbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Elverkini í Suðuroy umfata í løtuni:

- Elverkið í Vági við trimum dieselmotorum, tilsamans 9,7 MW. Hesir motorar eru riknir við tungolju
- Elverkið í Botni, sum er eitt vatnorku-verk við tveimum turbinum upp á til-samans 3 MW
- Elverkið í Trongisvági, sum ikki koyrir dagliga, men er til at taka við einum dieselmotori upp á 2 MW.

Vakthavandi maskinmeistari hevur yvirvaking av og lastfordeiling millum Vágsverkið og elverkið í Botni umframt netyvirvaking og koblingsleiðslu fyri elnetið í allari Suðuroynni.

Uppmøtingarstaðið er á Vágsverkinum, har vaktin hevur tilhald. Arbeitt verður á og út frá hesum arbeiðsstaðið til hini elverkini eftir tørvi, og fer flutningur vanliga fram við arbeiðsbili hjá SEV.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Palla Mortensen, verkmeistara á elverkunum í Suðuroy, ella til Berg Didriksen, deildarstjóra, báðir á telefon nr. 346800.

### Fyri bæði størvini er galdandi:

Tað er ein fyrimunur um tú hevur fulla maskinmeistaraútbúgving, t.v.s. víðkað maskinmeistaraprógv ella 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv og/ella royndir innan økið.

Størvini eru lønt sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Lønin verður ásett eftir starvsaldri frammanundan, sum verður roknaður frá prógvtøkudegnum, men er treytaður av fakliga viðkomandi arbeiði síðani tá.

Umframt nevndu løn kann roknast við vaktargjøldum og møguliga av og á eisini úrtíðarløn.

Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum verða sendar til:

Elfelagið SEV
Postrúm 319
FO-110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi mikudagin 12. mars 2008.

SEV

SEV er grundað á eina samhaldsfasta, fólkaræðisliga skipan, har tann vinningur, sum fæst burtur úr elsøluni, verður í høvuðsheitum nýttur til framtíðar útbyggingar av framleiðslueindum og elkervinum. Á tann hátt verður vinningurin øllum Føroya fólki at gagni, og útbyggingar kunnu fara fram, so hvørt samfelagið mennist, og streymtørvurin økist.
SEV hevur eina veitingarskyldu, sum áleggur felagnum at veita øllum borgarum, virkjum, stovnum o.s.fr. støðugan streym alt samdøgrið. SEV hevur sostatt bæði góðsku- og kervis-ábyrgdina í Føroyum. Starvsfólk hjá SEV verða útbúgvin og førleikament sambært galdandi reglum á økinum og krøvum, ið SEV setir til trygd og annað. Vitanin verður áhaldandi viðlíkahildin við bæði innanhýsis undirvísing og skeiðum og eftirútbúgvingum annars.

STARVSLÝSING




# Starvsfólk til fíggjardeildina

Vilt tú arbeiða í eini altjóða fyritøku við møguleika fyri persónligari og fakligari menning?

Faroe Ship sóknast eftir tveimum ágrýtnum og sjálvstøðugum starvsfólkum at arbeiða á fíggjardeildini fulla tíð. Í báðum førum er talan um størv við víðfevndum uppgávum.

## Starv sum skuldararøktari

Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um:

- Gjøgnumgongd av skuldaralistum
- Útsending av kontoavritum
- Gjaldsáminningar til kundar - telefonsamrøður/brøv
- Avstemming
- Dagligt samskifti við kundar og starvsfelagar á søludeildum o.ø.
- Eftirlit við, at innanhýsis mannagongdir um skuldararøkt verða hildnar
- Aðrar fyrifallandi uppgávur á fíggjardeildini

## Starv sum bókhaldshjálp

Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um:

- Vanligt bókhald
- Kreditorrøkt
- Aðrar fyrifallandi uppgávur á fíggjardeildini

### Førleikakrøv

Tú hevur góð samstarvsevni, arbeiðir sjálvstøðugt, ert opin og dugir væl at samskifta við kundar og starvsfelagar. Tú hevur viðkomandi roknskaparligt bakstøði við royndum frá líknandi starvi og hevur kunnleika til Microsoft Office.

### Umsóknir

Umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum kunnu sendast við teldubrævi til bogin@faroeship.fo ella við vanligum brævi til Faroe Ship, Eystara Bryggja, Postboks 47, 110 Tórshavn, att.: Bogi P. Nielsen.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Boga P. Nielsen á tlf. 239049 ella 349049.

Vit vilja seta størvini skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er 17. mars 2008.

SENDISTOVAN

FAROE SHIP
Góð sambond síðan 1919

Faroe Ship er flutningsfyritøka, sum saman við Eimskipafelag Íslands síðan 1. juli 2004 hevur myndað altjóða fyritøkuna Eimskip Group, ið er størsta flutningsfelag í Norðuratlanshavi, við egnum rutum til Evropa, USA, Baltalond og Ruslands.

Virkisøkið hjá Faroe Ship er innflutningur, útflutningur, innlendiskoyring, agency, vøruhotell og skundflutningsfyritøkan Faroe Express.